# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Jákup á Strandferðsluni í 30 ár



*Jákup Hansen saman við starvsfólkaleiðaranum, Páll Heinesen (vm.) og stjóranum, Kristian Davidsen*

*Mynd: Jens Kr. Vang.*

Fríggjadagin í farnu viku var móttøka á Strandferðsluni í samband við at eitt av starvsfólkunum har hevur verið knýtt at stovninum í samfull 30 ár.

1. juli 1975 – um sama mundið sum nýggi Smyril kom til landið - byrjaði Jákup Hansen hjá Strandferðsluni. Og fríggjadagin var so dagurin komin, tá hetta skuldi markerast.

Tað gjørdi leiðslan á Strandferðsluni við at bjóða til móttøku í hølunum Yviri við Strond, har bæði starvsfelagar og mong onnur nýttu høvið at støkka inn á gólvið fyri at heilsa uppá jubilantin.

Millum hesi var stjórin í Strandferðsluni, Kristian Davidsen og starvsfólkaleiðarin, Páll Heinesen. Í sambandi við dagin fekk hann eisini fleiri gávur, m.a. ein málning frá Strandferðsluni.

Hesi 30 árini hjá Strandferðsluni er Jákup nærum vorðin ein "býarmynd" hjá stovninum. Hann hevur havt sum uppgávu at ganga til handa á Farmadeildini, og ikki minst við at bera post millum báðar bygningarnar hjá stovninum.

- Hetta hava verið 30 góð ár, sigur Jákup, sum í januar mánaði næsta ár verður 55 ár.

# Ein unikur handil

**"Frú C" í Dr. Jacobsensgøtu, ið áður æt "Frú S, lat upp í apríl mánaði í nýggjum hami, og við nýggjum navni og eigara.**

HANDIL



*- Ein góður antikkur møbil er ein góð íløga, sigur Connie Jacobsen, leiðari í Frú C*

*Mynd: Bárður*

Nýggi eigarin Connie Jacobsen fer at halda áfram við teimum somu útveg-arum sum "Frú S" hevði. Men sum nakað "nýtt" ætlar hon haraftrat at selja antikkar vørur, eins og fyrrverandi eigarin gjørdi við ávísum millumbilum.

Hetta er ikki so vanligt í Føroyum, og heldur Connie tað vera sera hóskandi at selja gamlar møblar í hesum handli, tí tað hóskar sera væl inn í tann stílin hon annars selur.

- Eg fari javnan at fáa antikkar møblar. Møblarnir verða, um neyðugt bæði umvældir og málaðir, áðrenn eg fái teir, so alt er í sera góðum standi.

- Eg komi ikki at fáa fleiri eins møblar, og hetta vil gera tað enn meira "unikt". So tað ræður um at verða fyrstur, um tú ætlar at ogna tær ein ávísan møbil ið verður til keyps, sigur hon.

### Alt er relativt

Spurd um hesir møblar ikki eru dýrir at selja, sigur Connie við einum smíli: - Alt er "relativt".

- Ein "antikkur møbil", sum er í góðum standi, kann vera ein íløga og er at sammeta við eitt málarí ella kunst, - tað heldur veksur í virði, enn minkar.

Hon leggur aftrat, at um onkur ætlar at keypa sær ein slíkan møbil úr t.d. Danmark, kann tað blíva sera kostnaðarmikið. Tá skal ein gjalda fyri frakt og toll av fullum prísi.

- Tá eg keypi hesar møblarnar verður tað sjálvandi fyri ein sámiligan prís, og eisini loysir tað seg betur, hvat frakt viðvíkir, at fáa fleiri vørur í senn.

### Starvsdagur

Hin 3. juli í ár vóru liðin 30 ár síðani Jensia Jacobsen, Nólsoy byrjaði í starvi sum heimahjálpari.

†

## Andlát og jarðarferðir

Judith Olsen, fødd Kjærbo, ættað úr Sumba, búsitandi í Brøndbyøster, andaðist á Hvidovre sjúkrahúsi 29. juni, 78 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Brøndbyøster kirkju í dag, mikudagin klokkan 13:00.

Jarðarferðin hjá Óla Sørensen, Húsavík, verður úr heiminum hósdagin 7. juli klokkan 13:00. Bussur koyrir frá Teistanum klokkan 11:45. Sálmabókin verður nýtt. Tey, ið vilja minnast Óla, kunnu lata eina peningagávu til Leguhúsið í Nesvík, konta í peningastovnunum.

### Dagurin 6. juli

**Djóni.** Neyvan navn á einum halgimenni. Teir halda, at navnið av tilvild er komið upp í halgimannatalið. Djóni er stytting av grikska gudanavninum Dionysius.

Um Dionysius, deyður umleið ár 258, verður sagt um dag hansara (9. oktober) Hann varð vígdur til biskup av pávanum Fabiani og fór til Fraklands sum trúboðari. Varð saman við tveimum øðrum hálshøgdur á tí staðnum, sum nú eitur Montmatre, ið merkir martýrfjallið. Best kenda halgisøgan um Dionysius er, at hann eftir at vera hálshøgdur sjálvur bar høvd sítt til tann staðin, hann vildi verða grivin. Har var kirkjan St. Denis bygd.

†

Okkara kæra mamma, vermamma og omma

**Thurid Holm Jacobsen**

**Argir**

andaðist 4. juli í Keypmannahavn, 67 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Dánjal Jákup, May-Britt, Magnus og Anna Sofía**

†

**Óli Sørensen,**
**Húsavík**

andaðist leygardagin 2. juli 78 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr heiminum hósdagin 7. juli kl. 13.00. Sálmabókin verður nýtt.

Bussur koyrir frá Teistanum kl. 11.45.

*Familjurnar vegna,*
**Edith**

Tey, ið vilja minnast Óla, kunnu lata eina peningagávu til Leguhúsið í Nesvík.